

## Fakta um Lalandia

**Lalandia lat dyrnar upp fyrstu ferð í 1988**
**350 fólk starvast í Lalandia**
**71% av teimum vitjandi eru dani**
**19% av teimum vitjandi eru sviar**
**4% av teimum vitjandi eru úr Týsklandi**
**3% av teimum vitjandi eru úr Noreg**
**Umleið 1.000 gistingar um árið verða seldar føroyingum**
**Í Lalandia eru 25.000 fermetrar undir taki**
**750.000 gestir vitja Baðilandi árliga**
**1,2 milliónir litrar av vatni eru í Baðilandinum**
**tey servera 17.600 fløskur av húsins víni um árið**
**741 frítíðarhús eru í Lalandia**
**Pizzaria brúkar 16 tons av osti um árið**
**Baðilandi hevur pláss til 1.300 vitjandi í senn**
**Lalandia merkir Lolland á latíni**

**Ognarviðurskifti í Lalandia:**
**PARKEN Sport og Entertainment eigur 75%**
**Leiðslan í Lalandia eigur 25%**

**Meira kann lesast um Lalandia á www.lalandia.dk**

# Lalandia fyllir 20 í ár



Tað var Ejnar Jensen, entrepenørur, sum fekk hugskotið til at byggja Lalandina í 1980'unum. Ejnar Jensen úr Aalborg fekk hugskotið eftir ferð í vælumtóktum holendskum baðilondum.

Byggingin av fyrsta partinum av Lalandia varð gjørt í 1986-88. Latið verður upp í desember í 1988.

Í 1999 fær Lalandia nýggjar eigarar, tá REKA Gruppen úr Varde tekur yvir. REKA Gruppen fer undir at modernisera húsini, og síðani verða tey sundurmatrikulerað og seld sum privat frítíðarhús. Og tá Lalandia bjóðar at standa fyri útleiging av frítíðarhúsunum, eydnast hetta sera væl.

Sølan av frítíðarhúsunum útvegar nógvan kapital, og so verður farið undir eina nýggja umbygging av Lalandia.

Fyrsta stigið í umbyggingini byrjar í 2000. Í 2001 er Lalandia sentrið bygt saman við yvirdekkaðum arkadum.

Í 2002 verður aftur farið undir eina umbygging. Tá verður skoytubanin og skoytuhøllin bygd, eitt stórt uttandura spælipláss og ljósastoypari. Pláss verður eisini til at útbyggja matstovurnar, og eitt innandura spælipláss fyri tey smáu verður gjørt. Tilsamans eru meira enn 25.000 fermetrar til frítíðarupplivingar undir sama taki. Hetta er ikki hent í Danmark áður.

Vegna stóra eftirspurningin ger Lalandia av at byggja 68 frítíðarhús afturat. Tað hendir samstundis við tað næstu stóru útbyggingina av Lalandia. Tey nýggju húsini eru bæði størri og betri útgjørd enn hini húsini. Har eru pláss til seks vaksin og tvey børn. Húsini hava egnan savna og boblubað. Hesi frítíðarhúsini verða eisini seld privatfólki.

# Tað regnar ongantíð í Lalandia

Í Lalandia sleppa tit at gista í frálíkum summarhúsum, sum liggja beint við strondina við tað 25.000 fermetra stóra sentrið við alskyns innandura ítrivum. Har er stóra tropiska baðilandi, stórt spæliland, skoytuhøll, bowlinghøll og mant annað. Lalandia er ein frálíkur frítíðardepil fyri alla familjuna – árið runt.

Til ber at fáa meira at vita á *www.lalandia.dk*



**Kom skjótt til Lalandia við Atlantic Airways:**

Lalandi í eina viku kostar 15.995 krónur

Tá eru tit tvey vaksin og tvey børn

Hetta tilboðið er galdandi frá 27. juni til 9. august.

Íroknað prísin er flogferð við mati og drekka til Keypmannahavnar ella Billund, gisting í B2 húsi í Lalandia í eina viku við fríari atgongd til Baðiland, Monkey Tonky land, øll undirhald til børnini og reingerð við fráferð, ferðaavgjøld. Atlantic Airways kann eisini hjálpa til við leigubili. Orkugjald, sum er tvær krónur og tíggju oyru fyri hvønn brúkan kilowatt tíma av streymi verður goldið við fráferð.

**Til tey sum vilja hava eitt sindur meira – til Lalandia við bili**

Smyril Line bjóðar tykkum til Lalandia fyri 13.045 krónur. Tá verður gist í kamari uttan vindeyga og við fýra koyggjum við wc og bað umborð á Norrønu.

Íroknað kostnaðin er ferðin Tórshavn/Hanstholm fram og aftur í reyðgulari fráferð 22. mai til 29. august + ein bil og uppihald í eina vikua í íbúð B2. Avgreiðslugjald og oljugjald er íroknað kostnaðin. Orkugjald, sum er tvær krónur og tíggju oyru fyri hvønn brúkan kilowatt tíma av streymi verður goldið við fráferð.



*Góðir møguleikar eru at spæla golf í Lalandia. Stórur golfvøllur er uttan fyri økið við frítíðarhúsum - og inni í sentrinum ber eisini til at spæla minigolf*



*Monkey Tonkey Land í Lalandia hevur eisini eitt sera spennandi uttandura spælipláss*

# Fremstu ítróttarfólk vitja

Tá tey siga, at tað er altíð gott veður í Lalandia, og at tað ongantíð regnar í Lalandia, so passar tað. Har ber til at vera í øllum veðri – bæði í tí góða danska summarinum, men eisini í ringum veðri, tí so nógvir aktivitetir eru innandura. Í Lalandia hava tey eisini loyst stóra trupulleikan í ferðavinnuni sum er, hvussu tú fært selt upplivingar alt árið.

- Vit hava 25.000 fermetrar undir taki, har fólk kunnu hugna sær og njóta upplivingar – í bæðilandinum undir pálmum í tropiskum hita – so er kanst tú koma líka mikið, hvussu veðrið hættar sær, sigur Henrik Høgstrup, sum er marknaðarleiðari í Lalandia. Hann sigur eisini, at tey hava fleiri svenskar gestir í november enn í juli.

Spurdur hvussu nógvir føroyingar vitja Lalandia, sigur Henrik Høgstrup, at tey selja eina 1.000 gistingar um árið til føroyingar. Kanska ein lítili marknaður, men, sum hann sigur, alt ger mun.

Hóast Lalandia brúkar nógva orku upp á nýggja sentrið í Billund, so hendir eisini nakað í Rødby. Umframt nýggja uttandura baðilandið fyri 35 milliónir, so verða eisini bygdir tveir biografar, sum lata upp til jóla.

Tað eru eisini góðir ítróttar fasilitetir í Lalandia. Hetta gera eisini tey professiónellu ítróttarfólkini sær dælt av. Í juli kemur Ulrik Wilbeck við sínum hondbóltsmonnum í venjingarlegur í Lalandia, áðrenn farið verður til OL í Kina. Tá ber so til hjá gestunum at síggja teir venja.

Í viku 28 verður tað tey kalla "FCK Football Camps", ein fótbóltsskúli fyri børn, har teir professionellu leikararnir hjá FCK fara at venja børnini. Tiltakið verður alla vikuna, har børn so kunnu sleppa at venja í ein dag fyri 300 krónur.

# Nýtt Lalandia letur upp í Billund í summar

Tann 27. juni í ár letur eitt nýtt Lalandia upp í Billund í Jyllandi. Hóast sjálvt sentrið ikki verður liðugt í ár, so verður tá farið undir at leiga út 193 summarhús. Eitt ár seinni er baðilandið liðugt, og tað verður á sama støði, sum baðilandið í Lalandia í Rødby. Tilsaman verða 791 frítíðarhús.

Orsøkin til, at nýggja Lalandia júst verður bygt í Billund er sjálvandi, tí tað liggur sera væl fyri í Danmark, og har eru sera góðir ferðamøguleikar við flúgving – eitt nú flýgur Ryan Air, sum er tiltikið fyri bíligar ferðaseðlar, eini 20 ferðir um vikuna úr Billund Lufthavn – og ikki minst tí, at Lalandia verður granni við Legoland, og vænta tey nógv synergy burtur úr tí samstarvinum.

Hjá føroyingum er hetta eisini ein sera góður møguleiki at vera í Lalandia í nakrar dagar ávegis til onnur ferðamál sunnanfyri – tá gott flogsamband er úr Føroyum til Billund.